# Vatnflóðin í Pakistan er verri enn flóðaldan í 2004

**ÚTLOND** Í Pakistan eru 14 milliónir fólk rakt av vatnflóðini, og sambært einum ST-umboðsmanni er meiri umfatandi størri enn flóðaldan á jólum í 2004, hóast hon hevur kravt munandi færri mannalív

Árni Joensen:

– Hetta er verri enn flóðaldan í 2004, jarðskjálvtin í Pakistan 2005 og jarðskjálvtin í Haiti fyrr í ár, sigur Maurizio Giuliano, sum er talsmaður fyri ST-stovnin OCHA, sum samskipar tiltøkini í sambandi við náttúruvanlukkur. Hann vísir á, at jarðskjálvtin í Pakistan í 2005 rakti meiri enn tríggjar milliónir fólk, at flóðaldan árið fyri rakti fimm milliónir fólk, og at jarðskjálvtin í Haiti í vár rakti umleið tríggjar milliónir fólk.

Hinvegin hevur vatnflóðin í Pakistan kravt munandi færri mannalív enn hinar tríggjar náttúruvanlukkurnar. Sambært myndugleikunum hava umleið 1.600 fólk latið lív, og umleið tvær milliónir fólk eru vorðin heimleys.

### Hermenn við báti

Pakistanska stjórnin hevur sent herin at hjálpa teimum neyðstøddu. Hermenninir royna at sannføra fólk um, at tey skulu koma upp á teir serligu bjargingarbátarnar, sum herurin hevur, men ofta fara hermenninir avstaðaftur við tómum báti, tí fólk vilja ikki fara frá tí, sum tey eiga.

Í einari bygd, sum er at kalla skolað burtur, koma hermenninir fram á eina kvinnu. Hon hevur eitt smábarn í føvninginum. Tað hevur mist vitið, tí ein slanga hevur bitið tað.

– Sig okkurt við mammu! Bjargið barni mínum! Vakið hana, rópar hon grátandi, til hermenninir fáa fatur á henni og bjarga henni og barninum inn í bjargingarbátin.

Hermenninir halda fram leiðina, meðan teir rópa á fólk og biðja tey sleppa sær burtur haðani. Men tað eru tey fæstu, sum akta boðini. Soleiðis er tað altíð, tá tað er vatnflóð. Fólk vilja ikki fara frá sínum ella tí sindrinum, sum er eftir, og tey skilja ikki, hvussu vandafull støðan er.



*Hesin smádrongurin bleiv bjargaður úr heimbygdini, sum hann búði í*
*Mynd: Scanpix*

Herurin hevur sent einar 40 tyrlur til vatnflóðarøkið, men teir seinastu dagarnar hevur tað regnað so illa har norðuri í landinum, at tyrlurnar eru ikki slopnar á flog.

Heldur ikki seks amerikanskar tyrlur, sum eru komnar frá amerikanska herinum í Afghanistan, sluppu á flog orsakað av tí nógva regninum.

Tað nógva regnið teir seinastu dagarnar hevur oyðilagt fleiri vegir og brýr, og samstundis er tað vorðið truplari hjá bjargingarbátunum at koma vegin fram.

### Atfinningar

Pakistanski forsetin, Asif Ali Zandari, hevur verið fyri hvøssum atfinningum, tí hann valdi at fara til Bretlands og Fraklands í síðstu viku.

Samstundis halda fleiri, at myndugleikarnir vóru alt ov seinir at hjálpa fólki, og summi stúra fyri, at víðgongdar kreftir fara at gera sær dælt av støðuni við at hjálpa teimum neyðstøddu fyri á tann hátt at fáa betri fótafesti í økinum.

arni@sosialurin.fo

# Kanada bíðar eisini við at bora í póløkinum

**OLJUVINNA** Oljufelagið Chevron Canada hevur fingið leitiloyvi í einum parti av Beaufort Havinum, men felagið sleppur ikki at seta borin í undirgrundina enn. Eisini amerikanarar hava valt at bíða. Harafturímóti halda grønlendingar, at trygdin er í lagi

Árni Joensen:

Kanadiska ráðstovan, sum umsitur viðurskiftini har norðuri í landinum, kunngjørdi í síðstu viku, at oljufelagið Chevron Canada hevur fingið loyvi til at leita eftir olju og gassi undir havbotninum í einum ávísum parti av Beaufort Havinum.

Sambært kanadisku fjølmiðlunum er talan um eitt øki, sum er 205.000 hektarar nærhendis norðurstrondini í Yukon og einar 60 fjórðingar norður um oynna Herschel.

Men leitiloyvið, sum Chevron Canada hevur fingið, gevur ikki felagnum loyvi til at seta borin í undirgrundina enn. Aftan á tað, sum er hent í Meksikoflógvanum, hevur kanadiska stjórnin gjørt av at endurskoða tær lógir og reglur, sum galda fyri virksemið innan frálandsvinnuna. Og hesi endurskoðan má Chevron Canada bíða eftir, sigur BBC.

Sum skilst hevur Chevron goldið meiri enn eina hálva milliard krónur fyri leitiloyvið. Tað er galdandi í níggju ár, men felagið hevur bundið seg til at fara undir tær fyrstu kanningarnar innan fimm ár.

### Kleist nøgdur við trygdina

Tað er ikki bara Kanada, sum hevur valt at bíða við oljuboringum í tí arktiska økinum. USA hevur tikið somu avgerð eftir óhappið í Meksikoflógvanum. Men meðan kanadiumenn og amerikanarar hava gjørt av at útseta ætlaðar oljuboringar í tí arktiska økiinum, halda grønlendsku myndugleikarnir ikki, at nakar vandi er á ferð.

Í síðstu viku vóru Kuupik Kleist, landsstýrisformaður, og Ove Karl Berthelsen, landsstýrismaður í ráevnismálum, umborð á boriskipinum Stena Forth, sum borar nærhendis Disko Oynni fyri skotska felagið Cairn Energy. Tað var serliga trygdin, sum landsstýrisumboðini høvdu áhuga fyri.

– Vit fingu eina sera jaliga uppfatan av mannagongdini, sum verður brúkt í sambandi við boringina, segði Kuupik Kleist við grønlendska kringvarpið aftan á vitjanina. Umborð á Stena Forth fingu hann og Ove Karl Berthelsen eina frágreiðing um arbeiðið umborð, eins og teir vórðu kunnaðir um trygdarskipaninar.

– Vit kunnu staðfesta, at hetta er eitt av teimum best útgjørdu kanningarførunum í heiminum, har allar skipanir hava sum felags setning at seta trygdina í hásætið. Vit sóu eisini, at trygdin er ein partur av gerandisdegnum hjá teimum, sum arbeiða har, segði Kuupik Kleist við KNR.

### Kanada brynjar seg út

Samstundis sum Kanada hevur útsett oljuleiting á teimum arktisku leiðunum, brynjar landið seg av álvara til kappingina um ræðisrættindini í økinum.

Í hesi vikuni skulu nakrir serfrøðingar leggja seinastu hond á eina ætlan um at byggja erin ísbrótara, sum skal halda eygað við póløkinum og á tann hátt staðfesta kanadiska ræðisrættin. Av tí sama verður kavbáturin málaður reyður og hvítur sum kanadiska flaggið, skrivar Nunatsiaq News.




*Kuupik Kleist, landsstýrisformaður, umborð á boriskipinum Stena Forth*
*Mynd: KNR*

Tann nýggi kavbáturin, sum skal eita John Diefenbaker eftir einum fyrrverandi stjórnarleiðara, verður millum 130 og 140 metrar langur. Hann skal hava pláss fyri tyrlum, og manningin verður 110. Umframt eftirlit skal kavbáturin eisini brúkast til vísindaligar rannsóknir í póløkiinum.

John Diefenbaker, sum ætlandi fer sín fyrsta túr í 2017, kostar knappar 3,8 milliardir krónur at byggja.

arni@sosialurin.fo